**M.S.Sc. í samfelagsvísindi**

*M.S.Sc. in Social science*

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Útbúgvingin í samfelagsvísindi er skipað sum masterútbúgving, ið telur 120 ECTS og tekur tvey ár. |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og Samfelagsdeildin. |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Uttanríkis- og mentamálaráðið |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Galdandi frá November 2021. |
| STIG | Master "Second Cycle" sambært QF – EHEA og stig 7 sambært EQF - LLL. |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Endamálið er at útbúgva samfelagsfrøðingar og harvið víðka munandi um samfelagvísindaliga vitan, arbeiðsevni og sjálvstøðugt virksemi, við støði í teimum førleikum, ið bachelorútbúgvingin hevur givið. Útbúgvingin skal víðka um førleikar at nýta ástøði og háttalag innan samfelagsvísindi fyri sjálvstøðugt at fremja trupulleikagrundaðar verkætlanir, og harvið røkka fakligari dýpd og sjálvstøðugum avriki. |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Evnini fevna um menniskjans samspæl við samfelagsins strukturar, vælferð og institutiónir, og hvussu intentionel samfelagsmenning skapast við støði í avgerðum og virðum. |
| 2 | ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR | M.S.Sc. í samfelagsvísindum leggur dent á at skipa granskingargrundaðar, tvørvísindaligar og praksisrættaðar útbúgvingar, t.e. útbúgvingar við áherðslu á vísindaligt ástøði, háttalag og persónligar og kollektivar lærutilgongdir (trupulleikarættað arbeiði, praksislæra o.s.fr.). |
| 3 | KÓS | Á M.S.Sc. í samfelagsvísindum er kósin ástøðiligt og metodiskt innlit grundað á samfelagvísindaligar traditiónir við áherðslu á tvørvísindaligt og trupulleikarættað arbeiðslag, metodologiskan opinleika og kritiska støðutakan. |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Útbúgvingin hevur sum serligt eyðkenni, at tey lesandi kunnu skapa sær sín egna fakliga profil. Tí er partur av lestrinum (2. semestur) valfrítt semestur antin í Føroyum ella á útlendskum universiteti. Eisini skulu tey lesandi í praksislæru á arbeiðsmarknaðinum á 3. semestri. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Partar av undirvísingini og uppgávuskrivingini kunnu fara fram á øðrum máli enn føroyskum (t.e. skandinaviskum ella enskum). |

| C | STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Útbúgvingin gevur førleikar til leiðandi størv innan privata, almenna og sivilsamfelagssektorarnar, lokalt og altjóða. Tann spesialisering, sum liggur í tilgongdini, gevur serliga góðar starvsmøguleikar innan tað økið, ið tann lesandi velur sum sítt høvuðsøki. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | Útbúgvingin kann geva førleikar til víðari lestur á Ph.D. stigi (Third Cycle Programmes). |

| D | ÚTBÚGVINGARHÁTTUR | |
|---|---|---|
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Útbúgvingin er serlig 2 ára masterskipan [120 ECTS], ið byggir á tvørvísindaligt arbeiði, har læring sum virkin praksisfelagsskapur hevur serligan týdning. Umframt individuelt arbeiði verður dentur lagdur á interaktiva læring gjøgnum trupulleikagrundað verkætlanararbeiði, kollokvium, seminar og verkstovur og annað felags læruvirksemi. |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Skrivligar uppgávur við ella uttan munnliga verju. Munnligar royndir grundaðar á temaseminar. Fyri praksislæruna verður munnlig roynd við støði í skrivligum avriki. Serritgerðin verður vard munnliga. |

| E | ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR |
|---|---|
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | **Akademiskt arbeiðslag.** Dugir at viðgera og greina samfelagsvísindalig evni og egið valt fakøki, og megnar at skilja vísindaligt ástøði, háttaløg og arbeiðsgongdir, ið nýtt verða innan samfelagsvísindi.<br>**Persónligir eginleikar.** Megnar sjálvstøðuga, kritiska støðutakan og leiðslu innan samfelagsvísindi og egið valt fakøki.<br>**Sjálvstøðugt arbeiðslag.** Dugir at starvast á høgum samfelagsvísindaligum støði, hetta við atliti til evnis-, tilfeingis- og tíðaravmarking.<br>**Samskiftisførleikar.** Megnar at samskifta skrivliga og munnliga í samsvari við samskiftisstøðuna. |
| 2 | FAKLIGIR FØRLEIKAR |
| | **Yrkisgrundarlag**. Dugir at vísa breiða og neyva vitan um týðandi tættir innan samfelagsvísindi og sítt ávísa fakøki, ið byggir á viðurkenda vísindaliga gransking og fakligheit.<br>**Trupulleikaloysn**. Dugir at átaka sær granskingarlíknandi og granskingargrundaðar uppgávur, og at arbeiða trupulleikarættað og tvørvísindaligt á einum høgum samfelagsvísindaligum stigi.<br>**Samskiftiseginleikar**. Dugir at lýsa mál úr fleiri sjónarhornum, at greina hesi og leggja fram týðandi vitan innan samfelagsvísindi og egið valt fakøki. Evnar at kjakast við fakfelagar um hesi viðurskifti og við onnur, ið ikki eru serkøn í samfelagsvísindi.<br>**Sjálvstøða**. Evnar sjálvstøðugt at taka á seg uppgávur á høgum stigi, men samstundis hegni til at vera partur av einum arbeiðsbólki, umframt at leiða slíkar arbeiðsbólkar. |

| | |
|---|---|
| | **Leiðsla og menning**. Megnar at taka á seg greinandi arbeiðsuppgávur vegna privatar, almennar og sjálvbodnar fyritøkur, stovnar og felagsskapir, og at bjóða fram væl grundað uppskot at greiða praktiskar avbjóðingar. |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | - Meta um ástøðiligu og metodisku menningina innan samfelagsvísindi og valda fakøkið.<br>- Greina og meta um kjarnuhugtøk innan samfelagsvísindi og valda fakøkið.<br>- Kjakast um menning, ástøði og perspektiv innan samfelagsvísindi og valda fakøkið.<br>- Meta um, hvussu valda fakøkið kann setast í samband við onnur øki.<br>- Perspektivera samfelagsvísindalig hugtøk og ástøði, og greina støður og samanhangir í mun til samfelagsvísindi og valda fakøkið.<br>- Meta um, leiða og gjøgnumføra verkætlanir og menningararbeiði innan valda fakøki.<br>- Skriva vísindaligt tilfar.<br>- Meta um fakbókmentir og annað tilfar í mun til ein trupulleika ella evni.<br>- Sjálvstøðugt at velja út og brúka metodisk amboð innan fakøkið.<br>- Miðla ástøði, metodu, greining og úrslit á ein vísindaligan hátt.<br>- Greina viðkomandi ástøðiligar keldur.<br>- Lýsa og greina, hvussu úrvald háttaløg og arbeiðsgongdir kunnu brúkast at lýsa ein trupulleika.<br>- Fremja ástøðiliga, metodiska og empiriska vitan í praksis, hetta í greining, meting og analysu innan tey starvsøki, ið útbúgvingin miðar ímóti. |